VÍF-Neistin 31-33 (13-15):

# Avgerðin útsett



*Tað eydnaðist ikki vestmenningum at tryggja sær gullið sunnudagin, tá teir á heimavølli tóku ímóti Neistanum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Ætlaða gullveitslan í Vestmanna varð av ongum, tá Neistin fór við báðum stigunum, og nú mugu Vestmenningar helst bíða í tveir dystir afturat, áðrenn FM-heitið kann staðfestast**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Í leygardagsblaðnum skrivaðu vit, at tey riggaðu til gullveitslu í Vestmanna. Hetta tí menninir við einum sigri á Neistanum høvdu gjørt kvinnunum kynstrið eftir, og vunnið FM-heitið væl undan kappingarloki.

### Eingin gullroykur

Tað var tó lítil og eingin gullroykur yvir høllini í Vestmanna sunnudagin. Vanliga so mælska áskoðarafjøldin var nærum ikki at kenna aftur, og á vøllinum sýndu vestmenningar ikki sama gullspælið, sum teir onkun tíð hava víst.

Tað endaði eisini við, at Neistin fór avstað við báðum stigunum, soleiðis at vestmenningar enn mugu bíða nakað, áðrenn teir kunnu rópa seg meistarar, og skal rætt vera rætt, so var tað helst eisini í lagi, at tað gjørdist Neistin, sum fór avstað við sigrinum.

Lat tað verða sagt alt fyri eitt, at dysturin í Vestmanna als ikki var hin besti av teimum fýra, sum tey bæði oddaliðini hava leikt hetta kappingarárið. Ferðin var lægri enn í undanfarnu dystunum, og kanska var hetta eisini ein av orsøkunum til, at VÍF ongan tíð fekk veruligt tak á. Tað hevur nevnliga víst seg higar til í ár, at tá mótstøðan hevur leikt við lágari ferð, so hava vestmenningar havt sera trupult við at toga hesa upp, og tað tóktist, sum var tað júst hetta, sum Neistin ætlaði at nýta sum stýramboð.

Í øllum førum vóru tað teir bláu, sum settu ferðina ígjøgnum allan dystin. Við skili setta teir nógv á, tá møguleiki var fyri kontra, og um ikki, so varð uppspælið koyrt hampuliga róligt, uttan at óneyðug mistøk vórðu gjørd.

Vestmenningarnir megnaðu ongan tíð at seta seg yvir Neistin í hesum, og tí bar sjáldan til at loypa hvøkk á við mótálopum, sum annars eru eitt av sterkastu vápnunum hjá liðnum.

### Høvdu tamarhald á

Hetta gjørdi, at Neistin mest sum alla tíðina kundi halda fast um leiðsluna, sum liðið vann sær heilt tíðliga í dystinum.

At kalla alla tíðina var munurin eini tvey-trý mál, og tó at VÍF ongan tíð varð heilt afturúrsiglt, so sat áskoðarin alla tíðina við varhuganum av, at Neistin hevði betra takið hendan dagin. Eisini hóast VÍF eitt lítið skifti vann seg eitt mál fram um gestirnar.

Tað skuldi eisini vísa seg, teir bláu vóru stinnari. Seinastu løtuna var annars um reppið, at veruligur spenningur kom í, men hvørja ferð VÍF minkaði munin í eitt mál, vóru teir bláu skjótir at svara aftur, og tá vestmenningar so máttu satsa móti endanum, kundu teir bláu bara staðfesta við kontramálum.

### Einstaklingarnir

Umframt leikferðin var nakað av tí, sum avgjørdi dystin fyri Neistan, so slepst ikki undan, at tað serliga vóru tveir leikarar, sum skaraðu framúr hendan dagin.

Í fyrra hálvleiki gav Jacob Jónsson ferð eftir ferð dømi um, at hann er maðurin, sum kann skapa tað óvæntaða, tá hann einar fýra-fimm ferðir í heldur dølskum Neista-álopum brádliga eksploderaði, og sendi bóltin inn um væl vaksnu VÍF-verjuna.

Í seinna hálvleiki høvdu vestmenningar fingið nóg mikið av hesum, og valdu at taka Jacob úr spælinum, men tá traðkaði Heini Joensen til. 10 mál í seinna hálvleiki siga helst alt um hansara leiklut í dystinum, og so skal heldur ikki gloymast, at tá VÍF eisini royndi at taka Heina út seinastu løtna, so vóru tað aðrir, sum traðkaðu til, soleiðis at sigurin kundi endaliga staðfestast.

Hjá VÍF vóru tað einamest stórskjúttarnir báðir, Áki og Sámal, sum gjørdu um seg. Dystargongdin kundi kanska eisini verið ein onnur, um mongu skaðarnir hjá Áka ikki høvdu gjørt, at hann enn ikki fær spælt heilan dyst við fullari ferð. Í hvussu so er tóktist hetta vera einasta frágreiðingin um, hví Áki varð tikin av vøllinum eitt skifti í seinna hálvleiki, har hann annars veruliga hevði gongd í málskjótingini.

### Nert ein troyst

Fyri vestmenningarnar var tað sjálvandi ein smeitur, at teir soleiðis mistu møguleikan at staðfesta gullið, men hóast tapið, so er helst lítið at ivast í, at gullið fer at koma til høldar.

Somikið væl stendur til, at liðið bert skal hava fýra stig í trimum teimum seinastu dystunum, og hóast talan hevur verið um trupulleikar av ymsum slag í ár, so fara teir neyvan at tveita eina slíka leiðslu burtur.

Hjá Neistanum mundi sigurin heldur ikki tykjast vera meira enn ein troyst, nú teir eftir øllum at døma enda árið við tveimum silvurmerkjum. Kósin skuldi annars ætlandi setast móti gulli, men í avgerandi dystunum hava teir ikki verið nóg stinnir. At teir so í triðju royndini megnaðu at basa VÍF, kann um ikki annað vera teimum ein troyst. Meira fær tað neyvan verið.

### Dysturin í tølum

**VÍF-Neistin 31-33 (13-15)**

Málskjúttar:
VÍF: Áki Olsen 10, Sámal Joensen 8(2), Daniel Rápa 3, Piti Negru 3, Ingi Olsen 2(1), Petur Fr. Joensen 2, Johnny Joensen 2, Ragnar Zachariasen 1
Neistin: Heini Joensen 15(6), Jacob Jónsosn 7, Hans Áki Dal-Christiansen 5, Áki Mørk 3, Ragnar Stakksund 2, Ræni Slættanes 1
Brotskøst: VÍF 3, Neistin 7
Útvísingar: VÍF 3, Neistin 6
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen. Tóktist ivandi í løtum, men vístu tó myndugleika í seinastu avgerandi minuttunum.



*Í fyrra hálvleiki sýndi Jacob Jónsson ferð eftir ferð hondbóltskynstur, sum fáur leikari ger honum eftir, og allan seinna hálvleik sóu vestmenningar seg noyddar at mansverja íslendska bóltsnillingin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



VÍF-Neistin 23-21 (9-14):

# Sluppu við hvøkkinum



*Vanliga trygga VÍF verjan riggaði als ikki eftir vild fyrstu 50 minuttirnar, og hetta mundi kostað teimum dystin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VÍF hevur helst ongan tíð verið so nær við at tapt tey bæði seinastu árini, men í evstu løtu fingu tær mannað seg upp, so væntaði sigurin á Neistanum kom í hús**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Seinasta føroyska liðið, sum hevur vunnið á kvinnunum hjá VÍF, er Neistin, sum í seinasta dystinum á vári 2000 vann í Vestmanna. Síðani hava liðini leikt 11 dystir sínámillum í lands- og steypakapping, men hvørja ferð hevur VÍF drigið longra stráið. Sunnudagin var so 12. ferðin, og sum væntað, so vann VÍF aftur, men hesa ferð var nær við, at Neistin koppaði teimum. Heilt nær.

### Gekk striltið

Seinasta hálva árið ella so er tað nakrar ferðir komið fyri, at VÍF hevur havt trupulleikar við at motivera seg, og soleiðis var eisini, tá tær hittu Neistan sunnudagin.

Í verjuni vóru tær alt annað enn sannførandi í longum løtum av dystinum, og tá hesin parturin av spælinum ikki koyrir, so gongur einki hjá VÍF. Tær fingu at kalla eingi av vanligu kontramálunum, og ístaðin var tað Neistin, sum setti ferð á.

Munurin millum liðini vaks alsamt, og eitt skifti var Neistin eisini á odda 10-3, men so tók aftur at minka, og seinastu tíggju minuttirnar undan steðginum fekk VÍF so munin niður í fimm mál.

Undir vanligum umstøðum, so var hetta fyri VÍF ikki nøkur ræðandi leiðsla hjá mótstøðuliðnum, men hinvegin, so vóru umstøðurnar hjá VÍF ikki heilt vanligar hendan dagin. Vanliga so væl mannaði bonkurin var hesa ferð skerdur niður í tveir leikarar, harav onnur var málverji, og tí kundi liðið ikki eins og vant líta á breiddina, har liðið áhaldandi kann skifta út, meðan mótstøðan troyttast, so hvørt sum dysturin líður.

### Sálarliga yvirvágin

So hvørt, sum dysturin leið, tóktist laka byrjanin eisini at skula kosta VÍF sigurin hesaferð. Tó at heimaliðið onkun tíð hevði hug at nærkast, so megnaði Neistin hvørja ferð at svara aftur, og so við og við tóktust áskoðararnir at ásanna, at ein sensatión av teimum heilt stóru var ávegis.

Tá góðir 10 minuttir vóru eftir at leika, var Neistin framvegis fimm mál frammanfyri, men so hendi tað.

Tó at VÍF kanska ikki hevði vanligu fysisku yvirvágina, so prógvaðu tær tó, at sálarliga hava tær takið á øllum í deildini. Hetta kom til sjóndar, tá tær nú brádliga skutu trý mál á rað. Neistin var framvegis á odda við tveimum málum, men við at hyggja at leikarunum, so skuldi tú ikki trúð, at so var. Alt, sum líktist sjálvsáliti, var brádliga sogið úr teimum. Einki bit var í álopsspælinum, og tó at verjan koyrdi so hampuliga væl, so ført tú ikki hildið VÍF frá fatinum í átta minuttum á rað, tá á stendur.

Tað skal tó leggjast afturat, at tað at Neistin nú einki glið hevði í álopsspælinum, eisini komst av, at VÍF fyri fyrstu ferð í dystinum fekk verjuspælið at rigga. Royndu tær bláu at koma framvið, so vórðu tær alt fyri eitt trýstar, og kom eitt skot so loksins inn, so var Manuela á staðnum.

Endin av øllum hesum gjørdist, at VÍF skeyt sjey tey seinastu málini í dystinum, og at tær harvið tryggjaðu sær 21. sigurin á rað hetta kappingarárið.

### Veldst um hugburðin

Skal takast samanum, so kann í øllum staðfestast, at VÍF framvegis tykist hava trupulleikar við at motivera seg. Kanska er einki løgið í tí, tá liðið er somikið einaráðandi, men tað skerst ikki burtur, at tað er merkisvert, at hini liðini ikki megna at taka tær, tá spælið er, sum tað var sunnudagin.

Sum nevnt omanfyri, so er frágreiðingin helst tann, at VÍF so dyggiliga hevur sálarliga takið á øllum liðum í deildini. At eingin veruliga trýr uppá, at tað kann lata seg gera at vinna á oddaliðnum. Tað ger tað kanska heldur ikki, um tær spæla upp til sítt besta, men tað var so langt ífrá hesaferð. Tvørtur ímóti góvu tær Neistanum ein gyltan møguleika, sum við eitt lítið sindur av umhugsni og kanska eisini hepni kundi givið teimum ein týðandi sigur, hvørki av hesum var við teimum bláu seinastu løtuna. Spurningurin er so bert, um ein slík uppliving kann fáa tær hjá VÍF at taka í egnan barm. Ger hon tað, so er einki at ivast í, at talan verður um tríggjar stórsigrar í seinastu dystunum, men um ikki, so kann væl verða, at sensatiónin lúrir beint handan næsta horn á vegnum.

### Dysturin í tølum

**VÍF-Neistin 23-21 (9-14)**

Málskjúttar:
VÍF: Ioana Rápa 7(4), Nicoleta Radu 7, Jacklin Durhuus 5, Sóley Mikkelsen 3, Alis Høghamar 1
Neistin: Katrin á Neystabø 5(2), Mildrið Jacobsen 5, Gunnleyg Berg 5(1), Birita Wardum 3, Annika Thomsen 3
Brotskøst: VÍF 5, Neistin 4
Útvísingar: VÍF 3, Neistin 4
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen. Hildu eina hampuliga linju yvir allan dystin.

Sóljan-StÍF 21-25 (11-14):

# Vágoyggin er isolerað

**Og hesa ferð er tað helst ikki nóg mikið við einum undirsjóvartunnli. Í hondbóltshøpi sær nú svart út hjá Vágoynni, eftir at Sóljan tapti heimadystin fyri STÍF**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

StÍF vann sær eitt allar helst avgerandi fet í botnstríðnum í bestu kvinnudeildini, tá tær sunnudagin vunnu útidystin á Sóljuni.

Talan var um dyst millum uppflytararnar tey bæði seinnu árini, sum alt árið hava stríðst - við Kyndli sum triðja parti – um at sleppa av niðasta sessinum á stigatalvuni.

### Spenningur til tað síðsta

Hendan eigur Sóljan framvegis, og tó at tað leingi gekk javnt á á Giljanesi, so var tað ongan tíð soleiðis, at heimaliði hevði fatur á longra endanum.

Frá dystarbyrjan var tað hinvegin StÍF, sum legði harðiligari fyri. Tær vunnu sær rættuliga skjótt eina hampuliga leiðslu, og so ráddi um at halda fast. Hetta kom sjálvandi ikki av sær sjálvum, tí Sóljan svaraði alla tíðina aftur. Stríddust um hvønn einasta bólt. Hvørja ferð mótstøðan dragnaði, so svaraði heimaliðið aftur, so spenningurin varð í øllum førum hildin nakað langt út í dystin.

Tað var heldur ikki fyrr enn seinastu 10 minuttirnar, at avgerðin í dystinum fall. Tá megnaði StÍF endiliga at toga seg leyst, uttan at Sóljan kom aftur, og soleiðis gjørdist talan at enda um ein lívgevandi sigur.

### Sessurin bjargaður

Lívgevandi, tí tær á útiliðnum nú eru púrasta leysar av Sóljuni í botnstríðnum. Trý stig eru á muni, og hetta merkir saman við betra málmuninum, at hóast tað skuldi borið soleiðis á, at Sóljan vinnur dystin móti Kyndli og útsetta dystin móti StÍF úr grundspælinum, so er hetta ikki nóg mikið til at taka strandakvinnur aftur.

Í sjálvum sær var úrslitið eingin katastrofa fyri Sóljuna, men tá Kyndil samstundis vann hampuliga óvæntað á VB, so gjørdist tapið enn svárari. Sóljan er nú klárt niðasta liðið í deildini, og tað skal at kalla eitt undur til, um tilveran skal bjargast. Tær skulu nevnliga í minsta lagi hava trý stig afturat, uttan at Kyndil fær nakað, og við dystarskránni í huga, so verður hetta ein sera trupul uppgáva.

### Dysturin í tølum

**Sóljan-StÍF 21-25 (11-14)**

Málskjúttar:
Sóljan: Asta Petrauskiene 7(2), Hertha Simonsen 4, Heidi Maria Akselsen 4, Sólja Jóanesdóttir 3, Marjun Johansen 2, Johanna í Horni 1
StÍF: Alina Olaru 7(1), Poula D. Olsen 6, Ileana Manulescu 5(1), Anna Maria Berthelsen 3, Sunnfríð B. JAcobsen 3(2), Æta Gregersen 1
Brotskøst: Sóljan 3, StÍF 5
Útvísingar: Sóljan 3, StÍF 1
Dómarar úr KÍF: Vagnur Johannesen & Jákup Dam.